# Vil hava greiðu á leikluti løgmans

**Tórbjørn Jacobsen vil hava greiðu á, hvør leikluturin hjá løgmanni hevur verið í málinum um inntøkutrygdina**



POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Málið sigst vera loyst, men spurningurin, ið stendur eftir, er, hvussu tað er loyst í mun til lógargrundarlagið, tað verið seg lógirnar um minstuløn og dagstudning, mánaðarliganminstaforvinning og Stýrisskipanarlógina, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum vil hava løgmann at svara hesum í einum grein 52 fyrispurningi

Tórbjørn Jacobsen spyr, hví meginprinsippið broyttist hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, frá ikki at kunna gjalda út samsvarandi Stýrisskipanarlógini § 43, stk. 2, til tað diametralt øvuta, at skuldin til fiski- og útróðrarmenn kundi gjaldast út, hóast eingin heimild var í galdandi fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg tíansheldur í avgreiddum fíggjarnevndarskjali.

-Tá ið landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum skrivar í tíðindaskrivi og á egnari heimasíðu,soleiðis:»Landsstýrið hevur seinastu dagarnar viðgjørt útgjaldið í sambandi við inntøkutrygd fiskimanna. Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, hevur, saman við samgonguni, tikið avgerð um, at inntøkutrygdin verður goldin út eftir vanligu mannagongdini.«, hvørjum hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum tá ítøkiliga tikið avgerðina saman við? spyr Tórbjørn Jacobsen.

Hinir spurningarnir eru soljóðandi:

- Hvat liggur í orðunum í tíðindaskrivinum, at inntøkutrygdin nú skal gjaldast út eftir vanligu mannagongdini?

- Táið landsstýrið hevur viðgjørt málið í fleiri dagar, var løgmaður tá við í viðgerðini um útgjaldið, í sambandi við inntøkutrygd fiskimanna, og harafturat, var løgmaður við í avgerðini og hvørja støðu hevði løgmaður tá málið var avgjørt og avgreitt?

- Hvør heldur løgmaður hevur ábyrgdina av málinum, nú tað er avgreitt, í mun til lógargrundalagið sum nevnt er omanfyri?

- Hvør er samgongan og hvørjir eru løgfrøðingarnir hjá landsstýrinum og fíggjarmála-ráðnum, sum, sambært Útvarpi Føroya, hava mælt landsstýrismanninum í fiskivinnu-málum til at gjalda út inntøkutrygdina, hóast kontan á løgtingsfíggjarlógini var komin í trot, og eftir útgjaldið er yvirtrekt?

- Um løgmaður hevur tikið avgerðina um útgjaldið av inntøkutrygdini saman landsstýrismanninum fiskivinnumálum, hvussu ætlar hann eftirfylgjandi at útinna sín leiklut sum eftirlitsmyndugleiki, táið greinast og metast skal um, um landsstýrismaðurin hevur røkt sítt embætið á lógligan hátt?

- Hvat heldur løgmaður í heila taki um handfaringina av hesum málinum?

Í viðmerkingum til spurningin sigur Tórbjørn Jacobsen, at drál, dólskni og óvanliga vánalig politisk handfaring eru orsøkirnar til, at føroyskir fiski- og útróðrarmenn komu í ta støðu, at inntøkutrygdin ikki varð goldin rættstundis og samsvarandi lógunum um minstuløn, dagstudning og mánaðarligan minstaforvinning.

- Nú sigst málið vera loyst, í hvussu er samsvarandi fjølmiðlunum og heimasíðuni hjá Fiskimálaráðnum. Hóast landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum (kelda: Kringvarpið) við egnum orðum hevur garderað seg juridiskt og politiskt hjá løgfrøðingunum hjá landsstýrinum og Fíggjarmálaráðnum og í samgonguni annars, so er ongin fundarfrásøgn á heimasíðu løgmans (www.tinganes.fo) um tann landsstýrisfundin, har sjálv avgerðin skal vera tikin um málið. Tí veit ongin hvør var møttur á landsstýrisfundinum, og heldur ikki veit nakar, um málið var sett undir atkvøðugreiðslu, og tíansheldur hvat úrslitið av hesi atkvøðugreiðslu møguliga hevur verið, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann sigur eisini, at einasta greiningin, sum leikfólk og andstøða kunnu gera í málinum, er, at løgmaður er vorðin ein rættiliga sentralur leikari í avgerðini og avgreiðsluni av málinum um at gjalda út inntøkutrygdina, hóast kontan á fíggjarløgtingslógini 2009 var komin í trot og ongin heimild var í aðrari játtan og fíggjarnevndarskjalsamboðið, harumframt, als ikki hevur verið roynt í málinum.

---

# Hava ikki niðurraðfest føroyskt sum frálærugrein

**Tað sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum í svari til fyrispurning frá Tórbjørn Jaocbsen, løgtingsmanni**



POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í svarinum til løgtingsmannin sigur Helena Dam á Neystabø, at tvær orsøkir eru til, at eingin ráðgevi er í lærugreinini føroyskt í fólkaskúlaøkinum í Landsmiðstøðini í løtuni.

- Onnur er, at Mentamálaráðið arbeiðir við at skipa ein nýggjan stovn við at leggja Landsmiðstøðina, Kt-depilin og Føroya Skúlabókagrunn saman. Samstundis er ætlanin, at eftirútbúgvingin, sum nú er á Landsmiðstøðini, skal flytast út í ein eftirútbúgvingardepil á Fróðskaparsetri Føroya/Føroya Læraraskúla. Hin er, at ráðgevin í føroyskum, eins og tríggir aðrir ráðgevar, søgdu starvið frá sær í vár, sigur landsstýriskvinnan.

Helena Dam á Neystabø sigur víðari í svarinum, at tá Landsmiðstøðin sendi Mentamálaráðnum lýsing eftir ráðgevum til góðkenningar í vár, helt ráðið tað vera skilabest at bíða við at lýsa, til formligu viðurskiftini í sambandi við samanleggingina vóru komin upp á pláss. Í uppskotinum til lýsing frá Landsmiðstøðini varð søkt eftir tveimum ráðgevum, sum saman kundu ráðgeva í føroyskum, enskum, kristni, landalæru og søgu – tilsamans í 20 lønartímar.

- Hesi bæði – samanfallið millum ætlaðu bygnaðarbroytingina og at ráðgevin í føroyskum er farin úr starvi – eru sostatt orsøkin til, at eingin ráðgevi er í føroyskum á Landsmiðstøðini í løtuni. Sjálvsagt er tað sera óheppið ongan ráðgeva at hava, men vónandi eru bygnaðarbroytingarnar komnar so langt áðrenn ársskiftið, at ráðgevi í føroyskum aftur er á fólkaskúlaøkinum frá 1. januar 2010, sigur landsstýriskvinnan í mentamálum í svarinum til Tórbjørn Jacobsen.

# Jacob Haugaard í Bassa-búna lumpaði Finn Nørbygård



*Charlotte Lindholm, stjóri í Dansk Aktionærforening, Finn Danberg, undirstóri í Eik Banka, Finn Nørbygård og Jacob Haugaard, skemtarar*

**Maskotturin hjá Eik var miðdepil í einum skemtiligum innslagi á stórari partabrævamessu í Keypmannahavn fyrr í vikuni**

SKEMTARAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

»Tað kann bert vera Jacob«.

Soleiðis segði danski skemtarin, Finn Nørbygård, tá hann varð spurdur ein spurning á einum skemtiligum innslagi á stórari partabrævamessu fyri privatar íleggjarar í Keypmannahavn fyrr í vikuni.

Framman fyri Finn stóð maskotturin hjá Eik Banka.

Ein annar Finn, nevniliga Finn Danberg, undirstjóri í Eik, hevði spurt navnan, hvør mundi vera fjaldur inni í bassabúnanum. Um skemtarin kollgitti, skuldi hann vinna tilsamans 1.000 krónur og harvið meira enn tvífalda eina upphædd, ið Eik hevði sponsorerað til skemtaran at gera íløgur fyri.

Eftir at hava gitt gjørdi skemtarin bart, hálaði høvdið av Bassa ... og púra rætt. Har kom Jacob Haugaard til sjóndar við sínum eyðkenda brosi.

»Hej Finn«, segði hann.

Teir báðir skemtararnir eru sum kunnugt bestu vinmenn, og tí fekk Finn Nørbygård eitt ordans klemm frá vinmanni sínum.

Jacob Haugaard er sum kunnugt hálvur føroyingur og hálvur dani, og júst tað var ein boðskapur, ið Eik vildi hava fram á partabrævamessuni: Eik Banki hevur bæði virksemi í Føroyum og í Danmark.

Nú er Bassi kendur millum privatar íleggjarar í Danmark, og Finn Nørbygård, ið misti tað nógva av sínum ognum í IT Factory-gøluni, er vorðin 1.000 krónur ríkari…